# KJ: Við góðsku og relasjónum inn í framtíðina

**– Vit meta okkum at vera kappingarførar í prísi, tænastu og útgerð. Haraftrat hava vit gott og roynt fólk, og við hesum ætla vit okkum at røkka longur út í heim. Faroexpo er eitt gott høvi til júst hetta, siga marknaðarleiðarin, Sofus S. Gregersen og søluleiðarin, Viggo Johannesen hjá KJ Hydraulik í Kambsdali**

FAROEXPO
*Snorri Brend*
*Mynd: Jens Kr. Vang*


*Palfinger-kranarnir eru væl umtóktir í Føroyum. KJ Hydraulik er einaumboð í Føroyum – v.m. Sofus S. Gregersen og Viggo Johannesen*

**Kambsdalur:** Hóast tú ert kappingarførur í prísi, hevur eina góða framleiðslu og hevur drúgvar royndir, so er tað ikki alt.

Hjá KJ Hydraulik leggja teir eisini stóran dent á at skapa álit og relasjónir við kundarnar. Og hetta hevur eisini eydnast teimum.

– Tí er tað altíð ein trygd hjá kundanum, at hann kann hava álit á okkum, og at vit veita ta tænastuna, sum vit hava lovað.

– Starvsfólk okkara hava somuleiðis eina stóra tekniska vitan, og tí kann kundin altíð fáa fatur á einum starvsfólki, sum kennir til tann trupulleikan, sum kundin hevur, siga Sofus S. Gregersen og Viggo Johannesen.

Fyri at veita kundunum bestu tænastuna hevur fyritøkan eitt telefonnummar, sum svarar allar 24 tímarnar í døgninum alt árið ígjøgnum.


*– Vit ynskja at gerast meira sjónligir uttanlands, siga marknaðarleiðarin, Sofus Gregersen og søluleiðarin, Viggo Johannesen*

### Út í heim

Í dag er høvuðsarbeiðið hjá KJ Hydraulik at veita tænastur til fiskivinnuna og alivinnuna, tá talan er um ta hydraulisku útgerðina.

Hinvegin so bjóðar fyritøkan seg eisini fram á øðrum økjum, m.a. við vanligum smiðjuarbeiði, mekaniskum umvælingum, sum umboð fyri m.a. Palfinger—kranar og annað.

Teir átaka sær eisini at útvega eykalutir til teir mongu kundarnar í Føroyum og uttanlanda.

– Vit hava góðar kontaktir uttanlands, og tí er mál okkara at gerast enn sjónligari í øðrum londum, siga teir.

Í løtuni verða eini 15 % av vørunum seldar uttanlanda, men ætlanin er at hetta talið skal økjast munandi.

– Okkara mál er at økja hesa søluna munandi, og í longdini at koma heilt uppí ein triðing, siga teir.

Júst eitt slíkt forum sum Faroexpo er eitt hent høvi at hitta útlendsku kundarnar. Og teir vita longu um at her verða fleiri áhugaverdir kundar, sum teir ætla sær at tosa við um tænastur, eykalutir og annað.

– Oljuvinnan er eisini eitt øki, har vit síggja stórar møguleikar, siga Sofus og Viggo.

Í dag starvast 50 fólk í fyritøkuni.

# Kring heimin við El-Service

**El-Service hevur við árunum ment seg til eina vala fyritøku, sum hevur gott orð á sær bæði í Føroyum, Europa, Afrika og Asien**

FAROEXPO
*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Skála:** "Við at veita ta lovaðu góðskuna, vinna vit álit hjá kundanum, soleiðis at tað er kundarnir sum koma aftur, og ikki vørurnar!"

Hesi rámandi orðini hanga á fleiri støðum runt um í hølunum hjá El-Service á Skála. Hetta eru merkisorð, sum henda fyritøkan hevur gjørt sítt til at útinna.

Úrslitið av hesum sæst eisini aftur í tí sera víttfevnda virkseminum, sum fyritøkan hevur verið í, og framvegis er virkin í kring allan heimin.

Síðani El-Service varð stovnað í 1988 hevur fyritøkan luttikið í ymiskum verkætlanum, m.a. í Føroyum, Danmark, Fraklandi og Skotlandi, eins og í so fjarskotnum londum sum Tanzania, Malawi, Ghana, Cambodia og Vietnam.

Tað seinasta stóra arbeiðið, sum fyritøkan hevur verið í, var at gera høvuðstalvuna til ta elektrisku skipanina umborð á nýggja Smyrli. Hetta var samstundis tann største talvan, sum er framleidd í Føroyum.

– Vit ynskja eisini, at gongd skal koma aftur á føroyskt skipasmíð, soleiðis at vit eisini kunnu fáa ein útflutning á hesum øki.

– Tí eru vit við í fyrireikingini til Faroexpo, og vóna eisini sjálvir at fáa væl burtur úr, sigur stjórin, John Eli Joensen.

### Víða um

Ein stórur partur av virkseminum hjá El—Service er framleiðsla av alarm— og stýriskipanum til skip.

Fyritøkan hevur rættiliga drúgvar royndir á hesum øki, og hevur longu gjørt vart við seg á okkara leiðum, Afrika, Asien og í Canada.

Umframt hetta er El-Service einasta fyritøkan í Føroyum, sum hevur øll loyvi til at installera ta sonevndu Argonite sløkkiskipanina, bæði á lamdi og umborð á skipum.

Fyritøkan hevur somuleiðis øll loyvi og autorisatión til at installera brandalarm-anlegg á landi og umborð á skipum, og er haraftrat einasta fyritøkan her á landi, sum kann installera Co2—anlegg.

Annars sær El-Service eisini nógvar møguleikar í eini komandi oljuvinnu. Og kann væl henda, at okkurt munagott stig tann vegin verður tikið á Faroexpo í næstu viku.


*Eltalvurnar hjá El-Service eru vælkendar kring allan heimin. Her stendur stjórin, John Eli Joensen við eini talvu í hondini*